Løgmaður eftir útspælið frá Anders Fogh:

# Konfrontatiónin millum Føroyar og Danmark burtur – nú liggur uppgávan í Føroyum

**Við seinasta útspælinum hjá danska forsætisráðharranum, har føroyingar kunnu fremja allar yvirtøkur, sum ikki hava nakað beinleiðis við fullveldistøkuna at gera, er sjógvurin slættaður og øll konfrontatión millum Føroyar og Danmark søga. Nú eru tað bara vit sjálvi, sum skulu leggja til rættis tilgongdina, og tað er ferðin á m.a. yvirtøkunum, sum er lyklaorðið í komandi valstríði sigur Anfinn Kallsberg, løgmaður**

FORSÆTISRÁÐHARRA VITJAN OG VALSTRÍÐ
*Jan Müller*

Undan vitjanini hjá danska forsætisráðharranum í Føroyum í gjár úttalaði hann til donsku tíðinastovuna Ritzau, at hann fór ikki at seta seg upp ímóti eini tilgongd, har føroyingar kunnu yvirtaka øll mál, sum ikki eru tengd at fullveldistøku, tvs. uttanríkismál, verjumál og spurningarnar um felags mynt og kongshús.

Hetta heldur løgmaður vera sera kærkomin orð frá danskari politiskari síðu, tí tey flyta heilt málið um framtíðar tilgongdina á sjálvbjargnisleið til Føroya. Tá henda ósemja millum Danmark og Føroyar ikki er til longur, er tað bara upp til føroyingar sjálvar at gera av, hvussu nógv og hvussu skjótt tingini skulu yvirtakast.

Hetta er so eisini í tráð við tann nýggja sjálvstýrisleistin, sum løgmaður legði lunnar undir, tá allir samráðingarmøguleikar við danir vórðu úttømdir, og sum endaði við samtyktini á tingi um eina sjálvstýristilgongd fram til 2012. Fyrsta stigið í hesi tilgongdini vóru yvirtøkur fyri millum 300 og 400 mill. kr., ið ein meiriluti á tingi samtykti herfyri.

Anfinn Kallsberg sigur við Sosialin, at í tí leistinum, sum nýggi danski forsætisráðharrin eisini tykist at viðurkenna, eru hansara úttalilsi rætt endurgivin og tulkað, liggur ein møguleiki í prinsippinum at samráðast um øll mál uttan tey, sum hava beinleiðis við suverenitetin at gera, tvs. at tú sær burtur frá A og B málunum, og í veruleikanum fer frá einum positivlista til ein negativlista.



Anfinn Kallsberg, løgmaður leggur upp til eina breiða semju millum politisku flokkarnar eftir valið

### Nyrup setti treytir við

Løgmaður viðgongur, at tað málið hevði hann uppi at venda við táverandi danska forsætisráðharran Poul Nyrup Rasmussen í november í 2000 á einum loyniligum og óformligum fundi á Marienborg ein sunnudag seinnapart. Nyrup vildi tosa um tað, men har vóru nakrar treytir við. Eitt nú at Heimastýrislógin varð broytt samsvarandi. So tað er eingin fremmandur tanki, at man hevur tosað um hetta.

Anfinn Kallsberg heldur tí úttalilsini hjá Anders Fogh Rasmussen verða ógvuliga skilagóð. Tí á tann hátt slepst undan at fáa eitt rok um, hvat tú kanst samráðast um og hvat ikki. Tú hevur tá harafturímóti sagt, at í prinsippinum kann man samráðast um alt við undantaki av teimum fýra stóru málunum, ið eru knýtt at endaligu fullveldistøkuni. – Hetta er nakað tað sama, sum Nyrup hevur sagt, nevniliga at pengar og avgerðir skulu fylgjast at. So tað kann eg bara taka undir við. Tað tykist sum Fogh vil sleppa undan at rok skal verða knýtt at hesum málum longur.

Løgmaður sigur víðari, at tá ynski okkara um at kunna yvirtaka øll málsøki verður viðurkent av dønum, tá áttu vit frá føroyskari síðu at kunnað funnið eina sera breiða semju. Allir flokkar hava jú meira ella minni sagt, at teir vilja ganga við til at yvirtaka málsøki og gjalda fyri tey sjálvi. Ósemjan, sum tá stendur eftir, snýr seg um tempoið. Tvs. hvussu skulu hesi økini yvirtakast og nær.

### Fokus á semjur

– Við støðutakanini hjá Anders Fogh Rasmussen, trúgvi eg, at fokus meira kemur at verða á semjur í tí politisku skipanini í Føroyum. Út frá einum donskum sjónarmiði er tað helst eisini strategiskt rætt at gera tað teir nú gera, tí tá er tað ikki illstøða millum Føroyar og Danmark, sum setir dagskránna men meira ein spurningur, um føroyingar kunnu semjast.

### Hava flutt mørk

*– Men hví fóru tit so ikki eftir tí leistinum longu eftir seinasta val?*

– Trupulleikin eftir seinasta val var fyri tað fyrsta, at vit vistu ikki, hvat danir vildu ganga við til. Vit fóru eftir einum kendum leisti, sum danir høvdu lagt upp til, nevniliga tann millum Ísland og Danmark. Tað er greitt, at tað skal ein veldug politisk prosess til, áðrenn tú fær serliga teir mest víðgongdu sjálvstýrismenninar at góðtaka eina loysn uppá henda mátan vit nú hava lagt upp til. Vit hava so verið gjøgnum hesar samráðingar og hava staðfest, at hetta er einasti mátin at røkka fram til málsetningin. Tí vil eg siga, at samráðingarnar vit hava verið gjøgnum hava bæði flutt politisk mørk í Føroyum og í Danmark.

Løgmaður heldur tí eisini, at hetta hevur verið ein sera gagnligur útviklingur. – Nú byrja vit at koma yvir í tað sporið, at man frá føroyskari og danskari síðu verður meira samdur um, at hetta er ein brúkilig loysn. Eitt slíkt mál flytur mørk alla tíðina, annars kemur tú nevniliga ongan veg. Løgmaður ásannar, at tað hevur eisini verið við til at flyta Tjóðveldisflokkin longur inn móti miðjuni men leggur tó aftrat, at hevði verið tosað um at yvirtaka eftir Heimastýrislógini eftir seinasta val, so hevði Tjóðveldisflokkurin als ikki viljað verið við. Men eftir at man hevur funnið fram til, at hetta er einasta gongda leið, so hevur man (Tjóðveldisflokkurin m.a. blaðm.) verið so pragmatiskur hóast alt, at man hevur flutt seg hartil.



Anders Fogh Rasmussen, forsætisráðharri hevur við sínum seinasta útspæli beint burtur alla konfrontatión millum Føroyar og Danmark heldur løgmaður

### Føroyingar samdir um sjálvsavgerðarrættin

*– Men Tjóðveldisflokkurin vil framvegis hava danir at viðurkenna føroyskan sjálvsavgerðarætt!*

– Tað er so nakað, sum bara kann brúkast til at varðveita eina ósemju millum føroyskar og danskar myndugleikar sigur løgmaður og heldur sjálvur, at føroyingar eru samdir um sjálvsavgerðarrættin.

– Eg trúgvi ikki, at tað eru tvær meiningar um tað í tí føroysku politisku skipanini. Men danska stjórnin uppfatar sjálvsavgerðarrættin uppá ein annan máta enn føroyingar. Tað er nógv jura í hesum. So í veruleikanum eiga vit nú ikki at blíva við at koyra pannuna móti múrinum hvørja ferð og krevja av dønum, at teir skulu vera samdir við okkum um sjálvsavgerðarrættin. Tí hann er ikki nakað vit skulu hava frá dønum. Hann er nakað vit hava sjálvir. Tann dag vit føroyingar siga, at nú gera vit brúk av okkara sjálvsavgerðarrætti, tá hava vit fingið tað lyfti frá donsku stjórnini ferð eftir ferð, at man frá danskari síðu vil viðurkenna eitt slíkt ynski frá føroyingum. Tá teir siga, at teir vilja viðurkenna tað, so skulu vit lata danir í síni skipan sleppa at avgreiða ta viðurkenningina uppá sín máta og ikki krevja av teimum, at teir skulu avgreiða hetta uppá tann mátan vit halda vera rætt.

Anfinn Kallsberg løgmaður leggur aftrat, at á tann hátt slepst undan eini konfrontatión, men tað, sum er av avgerandi týdningi er, at vit gera okkara heimaarbeiði í Føroyum, soleiðis at vit fáa eina ógvuliga breiða undirtøku í føroyska fólkinum um tann dag vit skulu brúka okkara sjálvsavgerðarrætt. Tann prosessin liggur frammi í tíð-ini í hvussu er eisini eftir teimum ætlanum vit hava í dag. Tí heldur løgmaður, at tað als ikki er neyðugt at dyrka konfrontatiónina sum støðan er nú.

Løgmaður sigur seg annars hava bitið merki í, at tað er henda sama konfrontatión, sum Tjóðveldisflokkurin hevur boðað frá í arbeiði sínum á fólkatingi. – Tað hava teir sjálvandi sín fulla rætt til at gera har, men tað er ikki eitt mál, sum landsstýrið fer at taka upp á fundum við danska forsætisráðharran leggur hann aftrat.

Løgmaður heldur tað vera týðandi at endurtaka, at føroyingar eru samdir um, at vit hava henda sjálvsavgerðarrætt, og vit skulu helst koma í ta støðu – tá vit gera nýtslu av honum og siga, at nú taka vit fult sjálvstýri ella gera okkurt annað – at tað tá ikki liggja nøkur onnur argument ella sjónarmið ímillum eitt nú fíggjarlig hóttafall og ræðumyndir, soleiðis at føroyingar púra frítt kunnu gera støðuna upp. – Tað er tann prosessin, ið ikki skal byrja fyrr enn tað, sum nú er í gongd, er liðugt, nevniliga at vit hava yvirtikið øll málsøki og gjalda fyri tey, hava fingið ein sjálvberandi føroyskan búskap osfr. Tað einasta, sum tá er eftir, og vit koma til støðutakanina um hetta, er framvegis uttanríkis- og verjupolitikkur, myntfótur og kongshús. Hasi fýra málsøkini eru sambart grundlógini felagsumráði. Tvs. at tá skulu føroyingar taka støðu til, um vit skulu út ella vera verandi í ríkinum. Og tað liggur nakað frammi í tíðini.

### Frahaldandi í ríkinum

Løgmaður vísir á, at vit við verandi leisti hava sett hesa tilgondina fram til 2012. Tíðin vil vísa, hvat er realistiskt. – Tað, sum er umráðandi frameftir, er, at vit arbeiða soleiðis, at vit fíggjarliga gera tillagingarnar, og at vit umsitingarliga og politiskt taka ábyrgd av øllum økjum og gjalda fyri tað. Tað merkir aftur, at vit mugu góðtaka at vera partur av ríkisfelagsskapinum til ta tíð.

*– Men metir tú, at Tjóðveldisflokkurin uttan víðari gongur við til tað?*

– Tað er jú tað, sum hann hevur verið við til at samtykkja í tinginum. Tað er tað sjálvstýrisuppskotið snýr seg um.

*– Tað hevur verið sagt, at Tjóðveldisflokkurin hevur megnað at toga Fólkaflokkin langt við sær, onkur hevur brúkt vendingina heilt út á djúpt vatn, í síni fullveldisleitan. Vil tú við seinastu tilgongdini í huganum siga, at tað eru tit í Fólkaflokkinum, sum hava hálað hann innaftur á turt?*

– Eg haldi ikki, at Tjóðveldið hevur drigið okkum út á djúpt vatn ella nakran veg. Tvørturímóti eru vit nú í eini støðu, sum leggur upp til eina skilagóða og trygga tilgongd.

*– Men hava veljarakanningarnar ikki revsað tykkum fyri at hava ligið ov nær linjuni hjá Tjóðveldisflokkinum?*

– Tað er eisini púra rætt. Vit hava tann trupulleikan í Fólkaflokkinum, at vit hava ein veljaraskara, har ein partur heldur tað gongur ov seint, og ein annar partur heldur tað gongur ov skjótt. Tað er at kunna finna hesa javnvág, sum hevur verið trupulleiki okkara. Tí ræður tað um at fáa eina trygga tilgongd, har fólk kenna seg trygg við tað, sum hendir. Og tað er nettupp tað, sum eg meti vit hava fingið við tí sjálvstýrisleisti, ið er samtyktur.

### Breitt grundarlag

*– Metir tú, at fólk fáa eina trygga tilgongd, um samgongan heldur fram eftir næsta val?*

– Sjálvandi skal henda prosessin halda áfram. Og helst skal hon fremjast á einum so breiðum grundarlag sum gjørligt, og har vil Fólkaflokkurin fegin vera við.

*– Er núverandi samgongugrundarlag nóg breitt til tess?*

– Trupulleikin nú er tann, at vit sum er hava eitt parlamentariskt grundarlag, ið er nóg sterkt, men sum sær út til at verða viknað í veljaraskaranum. Tað er ótrúliga týdningarmikið í eini slíkari gongd, at fólk kenna seg trygg, og at tað er ein so breiður tryggleiki sum gjørligt. Ongantíð betur um allir flokkar kunnu taka undir við hesum.

Tí heldur løgmaður, at tað tá samanumkemur er ein spurningur um tempo, tvs. hvussu skjótur útviklingurin skal vera og hvussu tú fremur tingini, hvussu tú raðfestir tey osfr. – Tað verður væl hetta, sum verður avgerandi í teimum samgongumøguleikum, ið verða eftir komandi val leggur hann aftrat.

*– Tvs. at ferðin á yvirtøkum eftir tíni meting verður lyklaorðið í komandi valstríðnum?*

– Ja avgjørt – og aftrat tí tillagingin av búskapinum.

*– Koma hóttafall í samfelagnum, verður ferðin á yvirtøkutokinum tá at ganga seinni?*

– Tað er einki at ivast í, at Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin ynskja eitt spakuligari tempo enn vit aðrir. Vit hava td. hoyrt Sambandsflokkin siga, at hann vil yvirtaka øll málsøki men bara ikki nú. Javnaðarflokkurin hevur sagt, at teir kunnu vera við til at yvirtaka nakað fyri einar hundrað milliónir kr. og ikki fyri fleiri hundrað. Tað vísir, hvat vit tosa um.

### Uppgávan heim til Føroyar

Anfinnur Kallsberg sigur tí, at tað er ótrúliga avgerandi fyri seg í sambandi við vitjanina hjá Anders Fogh Rasmussen, at Føroyar og Danmark kunnu koma ásamt um, at tann leisturin, ið er valdur – hetta at tú kanst yvirtaka øll málsøki, uttan tey, sum eru beinleiðis tengd at suverenitetinum – ber til, og at tú harvið hevur fingið uppgávuna heim til Føroyar. At tann politiska skipanin í Føroyum síðani má syrgja fyri at gera ta tillagingina út frá tí ferð, sum hóskar eftir tí.

– Vit hava havt eitt uppskot til samtyktar í tinginum, sum ein meiriluti hevur tikið undir við, har vit hava sett upp eina tíðarætlan fyri eini sjálvstýristilgongd, og tað er greitt, at tann tíðarætlanin er málsetningurin hjá samgonguni. So fær man at síggja, hvat hendir við valið. Tað er alt nakað, sum liggur í veljarans hondum.

Løgmaður dylur heldur ikki fyri, at útspælið frá Anders Fogh Rasmussen kemur at ávirka føroyska valstríðið tann vegin, at einstakir flokkar kunnu ikki longur brúka eina konfrontatión millum Danmark og Føroyar politiskt á sama hátt. Tí út frá tí verður tað ein spurningur, hvussu tú leggur tingini til rættis í Føroyum. Hetta er tað valið snýr seg um.

# Rættasta avgerðin í lívinum

VALSKEIÐ RENNUR ÚT
*Jan Müller*

Samgongan heldur framvegis saman, hóast brotasjógvar eru. Og lagt verður upp til at halda fram eftir valið. Men hvussu kann løgmaður liva við at arbeiða saman við Tjóðveldisflokkinum, tá hesin ferð eftir ferð leggur løgmann undir at verða forðingin fyri fullveldinum eitt nú við at ikki at tora at taka eina fólkaatkvøðu um málið?

– Sum frálíður fer hvør tann einasti tjóðveldismaður í hesum landi at geva mær rætt í, at tað var tann rættasta avgerðin, sum Anfinn nakrantíð hevur tikið ikki at taka eina fólkaatkvøðu, og eg eri meira og meira sannførdur um fyri hvønn dag, sum fer, at hatta var ein tann skilabesta politiska avgerðin, ið eg nakrantíð havi tikið.

–Men tað skerst ikki burtur, at tú hevur fingið lemjandi kritikk frá tínum samstarvsfeløgum fyri tað?

– Tað havi eg fingið, tí at man tá vildi royna at spenna vøddar móti donskum myndugleikum, og tað hevði eitt einasta endamál, sum er framhaldandi konfrontatión millum Føroyar og Danmark. Og tað haldi eg vit síðani eftir at hava broytt leistin hava sæð var ikki tann rætti vegurin. Um tað, sum Anders Fogh Rasmussen nú sigur við Ritzau verður niðurstøðan á fundinum í Tinganesi mánadagin, so havi eg fingið tað váttað einaferð enn, at leisturin eg havi valt er rætti vegurin at fara. Tí eri eg eisini sera fegin um, at fólkaatkvøðan varð avlýst.

Løgmaður heldur ikki, at tað er nakar politiskur flokkur í Føroyum hevur nakað ímóti hesi gongd.

– Lyklaspurningurin í valstríðnum verður tá ikki eitt mál millum Føroyar og Danmark, men tað verður, hvussu vit í Føroyum megna at leggja útviklingin til rættis hjá okkum sjálvum. Tá er tað ein spurningur um at fara út til Føroya fólk og spyrja, hvussu man vil leggja hesa gongd til rættis.

– Veljaratølini hava ikki verið góð. Væntar tú, at nýggja útspælið frá Anders Fogh Rasmussen fer at gagna tínum flokki til valið?

– Eg vóni, at málið um tilgongdina í sjálvstýrismálinum úti millum fólk verður eygleitt sum ein varligur og tryggur útviklingur. Hetta er ikki nakað hasard. Tað skal byggja á búskaparligt kjølfesti og vera ein skipað tilgongd.

